## Grønland sum Saudiarabia

Kvamfjallið við Narsaq í Grønlandi kann sambært grønlendska kringvarpinum fáa sera stóran týdning fyri heimsins orkuveiting í framtíðini. Í fjallinum er sera nógv til at einum geiðslavirknum evni, sum eitur Thorium, og sambært jarðfrøðinginum Henning Sørenssen er líka nógv orka í sjálvum Kvamfjallinum sum øll oljan í heiminum. Verður økið kring fjallið tikið við, er orkumongdin tíggju ferðir størri, sigur hann. Í løtuni hevur avstralska felagið Greenlands Minerals and Energy kanningarrættin til Kvamfjallið, men Henning Sørensen mælir teimum grønlendsku myndugleikunum til at leggja ætlanir fyri, hvat skal henda, um felagið fer undir námsvinnu har.



## Gassið minkar skjótt

Nýggjar metingar hjá danska orkufelagnum Dong Energy vísa, at kanska verður einki gass eftir í tí danska partinum av Norðsjónum longu í 2112. Tað skrivar Berlingske Tiodende. Metingin samsvarar ikki við tað, sum Orkustýrið segði fyrr í ár. Tá varð sagt, at at við verandi framleiðslu verða tær donsku oljukeldurnar tómar í 2018 og gasskeldurnar í 2020. Orkustýrið helt, at meiti leiting kann avdúka nýggjar keldur. Men tað heldur Dong Energy ikki, og tí er felagið longu farið undir at tryggja sær gass úr øðrum londum. Umleið 500.000 donsk húsarhald brúka gass til at hita húsini ella íbúðina við.



*Tvey skip standa uppi á bedingini hjá MEST í Havn, eitt stendur uppi á Skála, og í dokkini á Skála standa tveir ísfiskatrolarar. – Tað hevur verið hampiligt við virksemi í juli og higartil í august, sigur stjórin, Eyðfinn Egholm*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

einasta dokk í Føroyum, umframt at bedingin á Skála júst er útbygd fyri nógvar miljónir.

- Nei, vit hava ikki stongt virksemi á Skála, men tað er eingin loyna, at flestu av seinastu uppsagnunum vóru har. Á Skála hava vit framvegis fólk, sum stíla fyri, og har hava vit eisini einar 12 lærlingar umframt goymslu.

Eyðfinn sigur, at samlaða talið av lærlingum hjá MEST liggur um 25-30, og hesir eru í læru innan ymisk øki í fyritøkuni, flestu tó innan smiðjuvirksemi av ymiskum slagi.

- Níggju av lærlingunum eru hjá fyrrverandi FJM í Runavík, sum serliga arbeiðir við rustfríum stáli, verksmiðjum til skip og virkir, umframt instaleringum av eitt nú kryvjimaskinum og øðrum útbúnaði til vinnuna.

Stjórin vísir á, at ein broyting í virkseminum hjá MEST er, at fólk nú í størri mun enn áður flyta ímillum arbeiðsplássinum, soleiðis sum tørvurin er.

- Hetta er alt ein partur av tillagingini til broyttu umstøðurnar, nú virksemi er nógv minni, enn tað hevur verið, sigur Eyðfinn Egholm, stjóri á MEST.

# MEST Service - sterkari úteftir

**Tríggjar lutfalsliga stórar føroyskar fyritøkur hava nú tikið seg saman til tess at veita fjøltáttaðar tænastur uttanlands**

ÍDNAÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki rætt, at føroyingar bara ”klandrast”.

Í fleiri ár hevur gevandi samstarv verið millum føroyskar fyritøkur og føroyskar veitarar av ymiskum tænstum.

Tá nýbyggingar, størri umvælingar og uppgávur skulu loysast her heima, hevur í fleiri ár verið vanligt, at ymiskir útbjóðarar taka seg saman og soleiðis – saman – hava staðið sterkari í kappingini við eitt nú útbjóðarar uttanlands.

Hetta hava vit sæð, tá størri skipaumvælingar skuldu gerast.

### Nú uttanlands

Tríggjar av fyritøkunum, sum áður hava verið felags um slíkar uppgávur, eru skipasmiðjusamtakið MEST, KJ-Hydraulik á Kambsdali og El-Service á Skála.

Nú hava hesi feløg saman skipað MEST Service, sum undir einum og sama hatti vendir sær uttanlands.

Fleiri føroyskar fyritøkur hava havt ymiskar uppgávur uttanlands, og kanska er tað serliga El-Service, sum vit hava hoyrt um í hesum sambandi.

Felagið á Skála hevur eitt nú verið partur av fleiri nýbygningum, sum donsk skipasmiðja hevur smíðað.

- Nú hava vit skipað okkum í eitt samstarv undir navninum MEST Service og bjóða okkum í felag fram uttanlands, sigur Eyðfinn Egholm, stjóri á MEST-samtakinum.

Hann vísir á, at fyrimunirnir við MEST Service er, at útboðið og tænastuvirksemið nú verður meira skipað, eins og tænastan undir einum hatti verður nógv meira fjøltáttað.

Ein annar fyrimunur, sigur Eyðfinn Egholm, er, at alt samskifti og skrivstovuvirksemi við atliti til MEST Service verður skipað undir einum.

- Vit kunnu nú marknaðarføra okkara tænastu úteftir undir hesum navni og við einum nógv størri og fjølbroyttari útboði – innan eitt nú mekanik, hydraulik og el.

Stjórin í MEST vísir á, at fyrstu uppgávurnar hjá MEST Service uttanlands eru við at koma uppá pláss, og væntandi er, at meira fer at spyrjast burturúr hesum, sum heystið líður.

- Jú, vit eru spentir upp á hetta virksemi, sum vónandi kann geva okkum enn eitt bein at standa á, sigur Eyðfinn Egholm.



*Stjórin í MEST, Eyðfinn Egholm*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*